Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Fólk til stuðulstoymið í Suðuroy

Stuðulstænastan søkir eftir einum fólki til stuðulstoymið í Suðuroy at arbeiða 40 tímar um vikuna til setan skjótast til ber.

Stuðulstænastan hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan til brúkarar um alt landið.

Stuðulstoymið í Suðuroy er ein tvørfakligur starvsfólkabólkur við 4 starvsfólkum. Málbólkurin hjá stuðulstoyminum er heimabúgvandi fólk yvir 18 ár, ið hava skerdan fysiskan og/ella psykiskan virkisførleika

**Arbeiðsuppgávan**
Arbeiðið umfatar fyri tað mesta, miðvíst at stuðla seinheilaskaddum brúkarum. Hendan arbeiðsuppgávan verður gjørd í tøttum samstarvið við einum øðrum stuðli. Ætlanin er, at tú saman við hinum starvsfelaganum kemur at arbeiða saman um hendan brúkaraskaran. Ætlanin er, at tætta samstarvið millum starvsfelagarnar skal koma brúkaranum til góðar við at betra um tilboðið til seinheilaskaddar brúkarar í Suðuroy.

Roknast má við, at tann, ið settur verður, eisini kemur at arbeiða við øðrum málbólkum enn seinheilaskaddum.

**Førleikakrøv**
Vit ynskja, at tú hevur eina viðkomandi útbúgving, so sum sjúkrarøktar-, almanna- og heilsu-, námsfrøðiliga-, ella aðra heilsufakliga útbúgving.

**Vit vænta, at tú**
- Kannst arbeiða sjálvstøðugt og einsamallur í heimi brúkarans og samstundis kannst átaka tær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um áhuga og intuitión.
- Vísir áhuga og virðing fyri brúkaranum og samstundis arbeiðir professionelt.
- Ert stuðlandi og hjálpir brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum.
- Hevur eina positiva menniskjafatan.
- Hevur hug og hegni til at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi.
- Ert opin, virkisfýsin og menningarkunnaður.
- Kannst handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan.
- Ert sterkur bæði til likams og sálar.
- Tú hevur eina viðkomandi útbúgving og royndir innan psykiatriska økið.

**Stuðulstænastan bjóðar**
- Góðar arbeiðsfelagar í toyminum.
- Supervisión.
- Fakliga menning, við viðkomandi undirvísing.

**Arbeiðstíðin**
Er 40 tímar um vikuna. Umsøkjarar sum ikki eru áhugaðir í fullari tíð, eru eisini vælkomin at søkja.

Tað er neyðugt, at tú hevur koyrikort.

Umsøkjarar við útbúgving innan almanna- og heilsuøkið og námsfrøðiligar, fáa løn eftir sáttmálanum hjá viðkomandi felag. Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primært ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at seta seg í samband við samskiparan Finnur Joensen tlf. 554025.

**Umsókn**
Umsóknin skal sendast til:

Nærverkið
Stuðulstænastan
Stílað: Regin Johansen
Argjavegur 26
160 Argir

**Umsóknarfreist: 31. oktober 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

# Samskipari til Amnesty

Søkt verður eftir samskipara til Amnesty International Føroya Deild.

Vit sóknast stutt sagt eftir eini eldsál, sum brennir fyri mannarættindaspurningum og sum hevur hug og hegni at standa fyri dagliga arbeiðinum hjá Amnesty International Føroya Deild.

## Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:
- at planleggja og gera langtíðarætlanir fyri deildina,
- at samskipa og fyriskipa átøk og tiltøk,
- at umboða deildina heima og í altjóða høpi,
- at økja um og tryggja inntøkugrundarlagið,
- at røkta heimasíðuna og gera kunningartilfar.

## Vit bjóða eitt starv, sum:
- gevur møguleika at arbeiða við mannarættindum,
- gevur pláss fyri nýskapan og øðrvísi hugskotum,
- er sjálvstøðugt og avbjóðandi við nógvum samskifti úteftir,
- gevur altjóða royndir.

## Førleiki
Vit vænta, at tú
- hevur hug at arbeiða miðvíst fyri mannarættindum
- hevur góð samskipingarevnir og góð samstarvsevni
- dugir væl at samskifta munnliga og skrivliga á føroyskum, norðurlendskum og enskum,
- hevur góðan kunnleika til teldunýtslu,
- hevur hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni.

Royndir frá líknandi starvi eru til fyrimuns, tó ikki ein treyt!

## Lønar- og setanartreytir
verða avtalaðar samsvarandi við royndum og førleikum. Starvið er fulltíðarstarv og verður sett frá 1. desember ella skjótast til ber. Roknast má við nakað av ferðing uttanlands.

## Meiri fæst at vita
við at venda sær til Elina Mortensen, samskipara, á tel 315816 / 515816 ella umvegis teldupost emortensen@amnesty.fo.

## Umsóknir
Freistin at søkja er 28. oktober 2008. Umsóknir við grundgevingum, prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu sendast til:

Amnesty International, Føroya Deild
Hoydalsvegur 6,
100 Tórshavn

Ella umvegis teldupost:
amnesty@amnesty.fo

Les meira um arbeiðið hjá Amnesty International á www.amnesty.fo

Sjónband 357774

ókeypis.fo
...fá meira fyri einki!
Fær inn á ókeypis.fo og svara nøkrum spurningum og verð við í lutakastinum um góðu vinningarnar!